## formuladeildin

**3. umfar, Skírsdag 13. apríl**

| | |
|---|---|
| EB/Streymur-ÍF | Georg Rasmussen |
| NSÍ-B68 | Petur Reinert |
| B36-KÍ | Eiler Rasmussen |
| GÍ-HB | Lassin Isaksen |
| Skála-VB/Sumba | Dagfinn Olsen |

**1. deild menn, 3. umfar, Skírsdag 13. apríl**

| | |
|---|---|
| FS Vágar 2004-VB/Sumba | Jóannes Mikkelsen |
| SÍ-Royn | Rúni Gaardbo |
| AB-LÍF | Ransin Djurhuus |
| TB-KÍ | Jón Sigurð Gleðisheygg |
| HB-B71 | Jens Petur Brattalíð |

**Steypakappingin kvinnur**

**Fjórðingsfinalur, Skírisdag 13. apríl**

| | |
|---|---|
| EB/Streymur-KÍ | Eugen Voda |
| NSÍ-GÍ | B68 |
| AB-HB | Fram |
| B36-ÍF | (B36 vinnur uttan dyst) |

# Gunnar verður við móti HB

**Nú skal vísa seg, um álopsspælarin, sum HB ikki vildi hava, verður kærkomin styrkur hjá gøtumonnum**

**GÍ-HB**

*Jóannes Hansen*

Fyrrapartin í dag var pappírsarbeiðið liðugt. Gunnar Nielsen, sum í fjør var í Fuglafirði, hevur nú loyvi at spæla við GÍ. Spæliloyvið hevur verið í Føroyum, men uppihaldsloyvið gekk út fyri ársskiftið, og tað er hetta, sum gøtumenn hava stríðst við, og sum kom upp á pláss í dag.

Gunnar Nielsen var fyri nøkrum vikum síðani og royndarvandi í HB, men har vendi tummulin niðureftir.

Fyrsti møguleikin hjá Gunnar í GÍ at vísa, hvør dugur er í honum, verður júst móti HB í Sarpugerði í morgin. Gunnar hevur vant fleiri vikur við GÍ, men honum restar ivaleyst dystarvenjing.

Áslakur R. Petersen hevur verið eitt sindur ivasamur. Annars eru allir GÍ spælararnir tøkir.

Í HB er alt fólkið tókt. Ein serbiskur álopsspælari hevur verið og royndarvant við HB. Enn er eingin avgerð tikin um, hvusssu tað verður við honum. Tað skilst tó á lagnum, at tað er rættuliga ivasamt, um hann fer at umboða HB í ár.

Seinastu árini hevur HB staðið seg væl í Sarpugerði. GÍ vann í 2001, og síðani hevur HB vunnið allar landskappingardystirnar í Gøtu.



# Avbjóðingin hjá ÍF er ógvuliga stór

**Nýggjur álopsspælari royndarvenur í Fuglafirði, men enn er eingin avgerð tikin um, hvussu tað fer at verða við honum**

**EB/STREYMUR-ÍF**

*Jóannes Hansen*

Fuglfirðingar fáa sína søk fyri í fyrstu umførunum. Teir hava spælt móti HB og B36, og í morgin skulu teir norður á Mølina at takast við EB/Streym, sum eigur at vera tilvitað um at fáa bæði beinini niður aftur á jørðina eftir søguliga sigurin á HB í Gundadali. Tað var í Gundadali, at ÍF í fyrsta umfarinum tapti 5-1!

Í Fuglafirði halda teir, at hugburðurin var væl betri móti B36, enn hann var í fyrsta umfarinum. Freistingin er kanska at skifta nógv út, men tað ætla teir ikki. Fleiri spælarar eru komnir til felagið fyri stuttum, og tað ræður um at spæla teir saman. Allir eru tøkir. Tað kann tó hugsast, at Bartal Eliasen, sum var í álopinum móti B36, verður fluttur aftur í miðverjuna í morgin.

Erik Ernesto Nielsen er nýtt navn í Fuglafirði. Hann er lítlibeiggi hjá Gunnari Nielsen, sum í fjør var í Fuglafirði. Hesin Erik kom til Fuglafirðar í gjár. Hann er álopsspælari, sum nú skal vigast. Hann vandi fyrstu ferð týskvøldið. Tað fara at ganga nakrir dagar og kanska vikur, áðrenn hesin álopsspælarin møguliga fer at spæla við ÍF.

Áki Petersen og Jonn Thomsen eru skaddir. Tað er rættuliga ivasamt, nær Jonn verður tøkur aftur.

Á Mølini er lagið gott. Allir teir, sum spældu móti HB, eru tøkir. Einasta ivamálið er málverjin René Tórgarð. Hann vandi ikki týskvøldið, tí hann var sjúkur. Um hann ikki verður tøkur í morgin, so fer Gunnar á Steig at verja EB/Streyma málið.

Knút Vesturtún og Fróði Clementsen vóru ikki við í Gundadali orsaka av skaðum. Teir vera heldur ikki við móti ÍF, sum teir í EB/Streymi siga seg avgjørt ikki at undirmeta.

# Vlada aftur í málið

**Skála hevur enn ikki vunnið í Formula-deildini í ár, og tí er nakað av trýsti á teimum, nú teir taka ímóti VB/Sumba**

**SKÁLA-VB/SUMBA**

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

Silvurvinnararnir av Skála hava fingið eina trupla byrjan í Formuladeildini í ár. Liðið hevur spælt tveir dystir og hevur bert fingið eitt stig higartil. Tað var seinast, tá ið teir spældu á útivølli í Klaksvík.

Nú spælir Skála aftur á heimavølli, og hesaferð kemur stigleysa liðið úr Suðuroynni, VB/Sumba, á vitjan.

Hetta er ein heimadystur, sum Skála í fjør tapti, men tað er tó eingin ivi um, at heimaliðið er størfavorittur hesferð. Og Johan Nielsen kann eisini fegnast um, at hann hevur allar spælarar tøkar, nú málmaðurin Vlada Filipovic ikki longur er leikbannaður.

Hjá VB sigast allir mans vera tøkir, nú teir skulu gera enn eina roynd at fáa fyrstu stigini í ár.




GITIÐ LEIKARAN



**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.

Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS